Løgtingslóg

um

royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at seta royndarskipan í verk um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi.

§ 2. Kommunulækni kann ávísa til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð sambært § 1 hjá sálarfrøðingi, sum virkar sambært sáttmála við Heilsutrygd.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um ávísing til viðgerð, tal av viðgerðum o.tíl.

§ 3. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. oktober 2023.

Samtykt á Løgtingi hin 27. oktober 2020 við 30-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 28. oktober 2020

stjóri

lm. nr. 25/2020